Eysturkommuna

# Fundarinnkalling

## Býráðið

**Dagfesting:** 31.08.2026 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Magnus Skoralíð
Hanna Jensen
Ann Fuglø
Heri Mikálsson
Pól í Skorini
Unn Jarnskor Ellingsgaard
Tórur Didrik Djurhuus
Uni Rasmussen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari:

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 43/26 | 26/00030-9 | Umsókn um byggiloyvi - um- og útbygging av sethúsum - matr. nr. 65 í Syðrugøtu | 2 |
| 44/26 | 26/00148-5 | Umsókn um byggiloyvi - Matr. nr. 339ad í Leirvík | 3 |
| 45/26 | 26/00309-5 | Umsókn um byggiloyvi - Bilhús - matr. nr. 57r í Norðragøtu | 4 |
| 46/26 | 26/00377-2 | Veganøvn til Eyðabø í Norðragøtu og Niklasmørk í Syðrugøtu | 5 |
| **Til viðgerð fyri afturlatnum hurðum:** | | | |
| 47/26 | 26/00067-8 | Kloakk - Nýgerð av kloakk við Biskupsmerkur | 5 |
| | | | |

## Til viðgerð:

## 43/26 Umsókn um byggiloyvi - um- og útbygging av sethúsum - matr. nr. 65 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.08.2026 | 22/26 | 26/00030-9 |
| 2 Býráðið | 31.08.2026 | 43/26 | 26/00030-9 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um byggiloyvi, dagfest 14. januar 2026, viðvíkjandi matr. nr. 65 í Syðrugøtu.<br><br>Søkt verður um loyvi til at um- og útbyggja verandi bygning á matr. nr. 65 í Syðrugøtu. Ein partur av ætlaðu útbyggingini verður staðsettur nærri enn 2,5 metrar frá marki.<br><br>Málið hevur verið til grannahoyring hjá eigarunum av matr. nr. 104a. Ongar viðmerkingar eru innkomnar í sambandi við grannahoyringina. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at geva frávik til út- og umbyggingina á matr. nr. 65 í Syðrugøtu. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. august 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 44/26 Umsókn um byggiloyvi - Matr. nr. 339ad í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.08.2026 | 24/26 | 26/00148-5 |
| 2 Býráðið | 31.08.2026 | 44/26 | 26/00148-5 |

**Málslýsing:**

**Uppruni til málið:**
Eysturkommuna hevur tann 18.03.2026 móttikið umsókn um byggiloyvi til bygging av sethúsum á matr. nr. 339ad í Leirvík.

**Lýsing av málinum:**
Umsóknin fevnir um nýbygging av sethúsum. Søkt verður um frávik til at staðseta bilhús við mark móti matr. nr. 339ac í Leirvík. Bílhúsið verður 8 metrar langt.

Málið hevur verið sent til hoyringar, og eingar viðmerkingar eru móttiknar í sambandi við hoyringina.

**Lógargrundarlag, ásetingar o.a.:**
Økið er staðsett í einum B-øki, sum er lagt út til bústaðarendamál.

Sambært ásetingunum í BK17 kann frávik gevast til at byggja upp ímóti 13 metrum frá grannamarki. Hæddin á bygninginum móti grannamarkinum er 2,5 metrar.

**Skjøl í málinum**
- Umsókn um byggiloyvi til nýggj sethús á matr. nr. 339ad í Leirvík
- Hoyringsskriv

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli**
Umsitingin mælir til at geva frávik at byggja í mark smb. tekningum.

### Byggi - og býarskipanarnevnd 19. august 2026
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

## 45/26 Umsókn um byggiloyvi - Bilhús - matr. nr. 57r í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.08.2026 | 25/26 | 26/00309-5 |
| 2 Býráðið | 31.08.2026 | 45/26 | 26/00309-5 |

**Málslýsing:**

**Uppruni til málið:**
Eysturkommuna hevur tann 23. juni 2026 móttikið umsókn um byggiloyvi til bygging av bilhúsi á matr. nr. 57r í Norðragøtu.

**Lýsing av málinum:**
Umsóknin fevnir um bygging av einum bilhúsi. Søkt verður um frávik til at staðseta bilhúsið við mark móti matr. nr. 57s. Harumframt verður søkt um frávik frá ásetingunum um hædd, við tað at bilhúsið verður 3,15 metrar høgt, sum er 0,65 metrar hægri enn loyvda hæddin. Bílhúsið verður 6,67 metrar langt.

Málið hevur verið sent til hoyringar hjá eigarunum av matr. nr. 57s og 57y. Eingin viðmerking er móttikin í sambandi við hoyringina.

**Lógargrundarlag, ásetingar o.a.:**
Økið er fevnt av einum B-øki, sum er lagt út til bústaðarendamál.

Sambært ásetingunum í BK17 kann frávik gevast til at byggja upp ímóti 13 metrum móti grannamarki. Hæddin á bygninginum móti grannamarki er loyvd at vera 2,5 metrar.

**Skjøl í málinum**
- Umsókn Sjúrðagøta
- Hoyringsskriv

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at geva frávik til bilhúsið.

## Byggi - og býarskipanarnevnd 19. august 2026
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 46/26 Veganøvn til Eyðabø í Norðragøtu og Niklasmørk í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.08.2026 | 46/26 | 26/00377-2 |

| Málslýsing: |
|---|
| 2 verkætlanir eru, ið tørva veganøvn.<br><br>Íbúðarbyggingin, Eyðabø, við Sjúrðargøtu í Norðragøtu er um at verða liðug. Í hesum sambandi skulu gøtunøvn tillutast vegunum í økinum.<br><br>Somuleiðis skal útstykkingin í Syðrugøtu, Niklasmørk, hava tillutað gøtunavn.<br><br>Navnanevndin hevði fund tann 15. juli 2026. Sí viðfestu fundarfrágreiðing. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| **Eyðabø:**<br>Navnanevndin mælir til, at niðasta gøtan fær navnið Sjúrðargøta, og at Gøtubrá fær nýtt húsanummar. Harumframt mælir navnanevndin til, at hinar báðar gøturnar fáa nøvnini Miðtún og Ovara Tún.<br><br>**Niklasmørk:**<br>Navnanevndin mælir til, at vegurin fær navnið Dalbøur. |

## Til viðgerð fyri afturlatnum hurðum:

## 47/26 Kloakk - Nýgerð av kloakk við Biskupsmerkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.08.2026 | 23/26 | 26/00067-8 |
| 2 Fíggjarnevnd | 27.08.2026 | 33/26 | 26/00067-8 |
| 3 Býráðið | 31.08.2026 | 47/26 | 26/00067-8 |

.